## Nýggja ársverks-skipanin

ÁRSVERKIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Fríggjadagin kunngjørdi landsstýrismaðurin í Mentamálum, Høgni Hoydal, at eftir summar-frítíðina skulu føroysku lærararnir undir eina nýggja skipan við ar-beiðstíðini. Føroysku lærararnir hava arbeitt undir skemabundnari skipan, men eftir summ-arfrítíðina verður farið til eina skipan við einari virksemisætlan fyri skúlaárið.

Skipanin hevur fingið íblástur frá skipanini á arbeiðsmarknaðinum. Vanliga verður mett, at arbeiðstíðin er 2080 tím-ar um árið. Tekur ein frítíð og frídagar frá skipanini, eitur talið 1800 tímar hjá lærarar-um. Ársverkið er sostatt gjørt upp til 1800 tímar árliga.

Arbeiðstíðin hjá lærar-um verður í framtíðini býtt í skúlatíð og egintíð.

Skúlatíðin umfatar floksundirvísing, bólka undirvísing, lærarasam-starv, steðgir, bólka-undirvísing o.a. Egin-tíðini ræður lærarin sjálvur yvir, og umfatar fyrireiking, ráðlegging eftirmeting og samskifti við lærarar. Egintíðin er treytað av skúlatíðini hjá lærarum, og lagt er upp til at hálvur tími egintíð fyri hvønn undirvís-ingartíma. Undirvísir ein lærari 27 tímar eina viku, so hevur hann rætt til 13,5 tímar í egintíð ta vikuna.

Endamálið við árs-verksskipanini er at fáa eina greiða áseting hvat lærarastarvið umfatar. Eftir summarfrítíðina verður møguleiki at hava eftirlit, hvørjar uppgávur hvør einstakur lærari átekur sær. Eftir ætlan skulu lærari og skúla-leiðsla seta seg saman minst fýra vikur, áðrenn skúlaárið byrjar at til-rættarleggja virksemis-ætlanina hjá læraranum fyri skúlaárið.

Ein arbeiðsbólkur við fimm limum hevur orð-að nýggju skipanina við ársverki. Tvey umboð hava verið fyri lærararn-ar, tvey fyri Mentamála-ráðið og eitt fyri Fíggjar-málaráðið. Í fyrstu at-løgu verður talan um eina tvey ára royndartíð, har skipanin síðan verð-ur tikin til eftirmetingar. Arbeiðsbólkurin skal hesi bæði árini fylgja við gongdini á skúlunum kring landið, og leggja fram uppskot um møgu-ligar tillagingar ella broytingar við skipanini.

Ásmund Lamhauge stjóri á Runavíkar Skúla:

# Áttu at bíða eitt ár

**Stjórin á Runavíkar Skúla metir ógreiðu meldingarnar frá Mentamálaráðnum darva tilrættarlegg-ingini av komandi skúlaári. Kortini metir hann ársverkið verða eina stóra og spennandi avbjóðing fyri bæði skúla-leiðslur og lærarar**



ÁRSVERKIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Ein av mongu skúlastjórun-um í Føroyum, sum í løtuni situr við nýggju ársverks-skipanini, er Ásmund Lam-hauge stjóri á Runavíkar Skúla. Runavíkar Skúli er ein av størstu skúlunum í landinum, og tað skal tí ein drúgv tilrættarlegging ger-ast fyri komandi skúlaár. Ásmund Lamhauge er rættiliga avgjørdur, tá vit spyrja hann, hvat hann hel-dur um nýggja ársverkið.

– Vit áttu avgjørt at bíða eitt við ársverksskipanini, tí vit eru ikki tilreiðar enn. Mentamálaráðið er komið alt ov seint við broytingini, og tí verður tað torført at leggja nýggju skipanina til rættis, sigur stjórin í Runa-víkar Skúla.

### Ógreiðar meldingar

Ásmund Lamhauge fílist á, at Mentamálaráði hevur meldað ógreitt út viðvíkj-andi ársverksskipanini.

– Taka vit spurningin um tað vit kalla niðurskurð, so fingu vit av fyrstani tíð at vita, at 120 tímar vórðu settir av, men skúlaleiðsl-urnar mótmæltu, og fingu lovað, at 150 tímar vórðu avsettir. Kortini boðar Mentamálaráðið frá, at tað verða 120 tímar í miðal fyri lærararnar avsettir, greiðir skúlastjórin frá.

Ásmund Lamhauge vísir á, at ógreiðu meldingarnar gera tað torført at leggja eina ætlan fyri komandi skúlaár.

Á Runavíkar Skúla eru tey í tí støðu, at skúlin kom-andi skúlaár fer at hava fleiri fjøllbrekaðar næm-ingar, sum krevja ein ávís-an tørv. Hetta krevur, at eini 6-8 lærarar mugu seta nógva tíð av til ráðlegging, fundarvirksemi og skeið-virksemi, og tá kvotan er 120 tímar í miðal fyri hvønn lærara, verða tað fleiri lærarar, ið mugu taka til takkar við minni enn 120 tímum, og tað er óheppið, metir Ásmund Lamhauge.

### Stór avbjóðing

Hóast skúlastjórin í Runa-víkar Skúla metir, at árs-verksskipanin átti at verðið útsett eitt ár, so er hann ikki í iva, at skipanin er ein stór og spennandi avbjóðing fyri skúlaleiðslurnar og lærararnar kring landið.

Hann er í løtuni ígongd við at leggja tey síðstu skemaðini hjá lærararunum fyri komandi skúlaár, og fríggjadagin, tá lærararnir fara í summarfrí, fáa teir oyðipappír, har teir skulu gera eitt uppskot til virk-semisætlanina fyri kom-andi skúlaár. Ásmund Lam-hauge fer síðan at hyggja nærri at uppskotunum hjá hvørjum einstøkum lærara.

Síðan skulu lærarar og leiðsla saman leggja enda-ligu virksemisætlanina til rættis, áðrenn skúlarnir byrja aftur 18.august.

# Ársverkið keðiliga byrjan

**Magnus Tausen, sum er ein av limunum í arbeiðsbólkinum, ið hevur lagt uppskotið um Ársverksskipan-ina fram, skilur væl, um lærarar kenna seg ótryggar við at fara til arbeiðis eftir summarfrítíðina. Tað er stak óheppið, at skipanin er trýst yvir okkum, metir Magnus Tausen**



*Annar av umboðum fyri lærararnar í arbeiðsbólkinum, ið hevur orðað ársverkið, Magnus Tausen, sigur seg skilja væl um lærarar kenna seg ótryggar við at fara til arbeiðis við nýggju skipanini.*

*mynd: Savnsmynd*

ÁRSVERKIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Annað av umboðunum fyri lærararnar í arbeiðsbólkin-um, Magnus Tausen, er harmur um, at Høgni Hoy-dal fríggjadagin setti árs-verksskipanina í verk frá komandi skúlaári.

– Ein av høvuðstættunum í skipanini er samstarvið millum lærara og leiðslu, men nú skotbráðið er ov stutt, er rættiliga sannlíkt, at tann parturin verður lop-in um. Hetta er stak óhepp-ið, tí skipanin fer tí at fáa eina keðiliga byrjan, sigur Magnus Tausen.

Magnus ivast ikki í, at flestu lærarar eisini kenna seg ótryggar at fara í skúla eftir summarfrítíðina, tí teir eru ikki fullgreiðir yvir, hvat teir koma til. Tað er heldur ikki serliga hugvekj-andi at byrja eina nýgga skipan í einum keðiligum anda, sigur Magnus Tausen.

Sum skilst á skúlastjór-um kring landið, so eru flestu teirra í gongd við at leggja skema fyri lærar-arnar komandi skúlaár. Av tí, skúlaárið er við at halla, verða sjálvar virksemisætl-anirnar hjá hvørjum lærarar ikki tilrættarlagdar fyrr í august.

Fyri at skúlaleiðslurnar yvirhøvur kunnu megnað at samskipa allar virksemis-ætlanirnar, er neyðugt at nýta partar av summarfrí-tíðini til arbeiðið. Hetta heldur Magnus Tausen verða keðiligt, og sloppið kundi verðið undan støð-una, um ársverkið bíðaði eitt ár.

### Opin fyri broytingum

Magnus leggur dent á, at skipanin við ársverki als ikki er endalig.

– Skipanin er opin, og møguleiki er fyri tillaging-um og broytingum, og tey bæði royndarárini fara vísa, hvørjar broytingar eru neyðugar fyri at skipanin skal rigga til fulnar, greiðir Magnus Tausen frá.

Spurdur um nýggja skip-anin við ársverkum ikki gongur ímóti rákinum á ar-beiðsmarknaðinum, har fólk arbeiða meir og meir flekstíðir, og ikki eru bund-in av at verða á arbeiðs-plássinum, svarar Magnus, at tað kann væl verða nakað um tað, men vísir á, at hvør einstakur lærari hevur nógva tíð, sum hann sjálvur ræður yvir.

– Lærarin verður bundin av at verða í skúlanum og undirvísa, meðan restin av tíðina kann hann nýta sum hann vil. Nær lærarasam-starv, fundarvirksemi, for-eldrafundir o.s.fr. verða, verður upp til hvønn ein-stakan lærara og ikki ovastu leiðslu á skúlanum, og tí hevur skipanin eisini tikið hædd fyri flekstíðini, sigur Magnus Tausen at enda.



# Meira hýsa enn toskur í Klaksvík

**Av teimum 70 tons-unum av útróðrar-fiski, sum seld vórðu á gólvinum á Fiska-marknaði Føroya í Klaksvík í gjár, vóru 40 tons av hýsu, 20 av toski og eini 7 tons av hvítingi**



*- Fiskaprísirnir eru skiftandi. Mánadagin vóru teir hampiligir, men týsdagin fullu teir aftur, siga tey á Fiskamarknaði Føroya í Klaksvík*

Fyrrapartin í vikuni var næstan bara útróðrarfiskur seldur um Fiskamarknaðin í Klaksvík.

Í gjár vóru umleið 70 tons seld á gólvinum, harav umleið ein triðingur kom frá bátum, sum rógva út av Hvannasundi. Størri partur-in kemur tó frá bátum, sum rógva út av Klaksvík.

Í gjár seldi trolbáturin, Dúgvuberg, eisini veiðina á marknaðinum har norðuri.

### Mest av hýsu

- Tað er eitt stórt tal av út-róðrarbátum, sum royna við línu og selja fiskin á gólv-inum her norðuri. Misjavnt er, hvussu fiskiskapurin er, men teir flestu bátarnir munnu liggja um góð 100 pund á línuna. Tað er hampiligur fiskiskapur hesa tíðina av árinum, siga tey í Klaksvík.

Í vikuni hava bátarnir fingið nógv meira av hýsu enn av toski.

Av teimum umleið 70 tonsunum, sum vórðu seld á gólvinum í gjár, vóru 40 tons av hýsu, 20 tons av toski og eini 7 tons av hvítingi.

- Hýsan er góð, og eftir árstíðini er toskurin eisini hampiliga góður, siga tey.

Umframt útróðrarfisk, fer Fiskamarknaðurin í Klaksvík í dag at bjóða út lastina hjá línuskipinum, Pison, sum hevur roynt undir Føroyum og fiskin hjá trolbátunum, Fiskakletti og Varðanum.

Hvussu nógv skipini hava, vistu tey ikki, tá ið vit fréttu í gjár.

Fiskamarknaðurin vænt-ar, at línuskipið Kvik, sum hendan túrin hevur roynt undir Íslandi, landar fríggjadagin. Kvik hevur góð 100.000 pund.

### Upp og niður

Fiskaprísirnir eru mis-javnir. Mánadagin vóru menn hampiliga væl nøgd-ir, men týsdagin fall prísurin aftur.

Á Fiskamarknaðinum í Klaksvík halda tey, at prísirnir eru í lægra lagi, tá ið teir fella.

- Men tað veldst sjálvsagt um eyguni, sum síggja. Teir, ið selja fiskin, halda ivaleyst, at prísirnir kundu verið betur, meðan keypar-ar halda, at fiskurin er nóg dýrur í mun til tað, sum fæst burtur úr honum, siga tey á Fiskamarknaðinum í Klaksvík.

# Einki spurdist burtur úr í Kanada

**Nú okkara fiskimála-ráðharri og hansara menn komu aftur úr Kanada sum av torv-heiðum, fara vit at hyggja eitt sindur eftir, hvat stríðið um rækjurnar á Grand Bank í veruleikanum snýr seg um. Fund-urin í Halifax millum Jacob Vestergaard og kanadiska fiskimála-ráðharran, Robert Thibault, endaði úrslitaleysur**



*Heldur ikki beinleiðis samrøðurnar í Halifax millum føroyskar og kanadiskar myndugleikar kundu loysa upp í kreppuni millum londini. Og framvegis eru kanadiskar havnir stongdar fyri okkara fiskiskipum…*

STRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*

Tað var miðskeiðis í nítiár-unum, at føroysk rækjuskip byrjaðu at fiska á Flemmish Kap (øki 3M), sum er altjóða sjógvur, ið verður umsitin av NAFO (North Atlantic Fishery Organisation). Tað er Dan-mark, sum umboðar Føroy-ar og Grønland í NAFO.

Rækjumenn eru nøgdir við fiskidagarnar, ið okk-um eru tillutaðir á Flemm-ish Kap.

Men skjótt høvdu okkara slóðbrótarar innan rækju-vinnuna hug at royna aðrar møguleikar um hesar leiðir. Eyguni vórðu vend móti Grand Bank (øki 3L), sum liggur innanfyri og vestan-fyri Flemmish Kap. Megin-parturin av Grand Bank liggur innanfyri kanadiska fiskimarkið, og bert ein minni partur av bankanum røkkur út í altjóða sjógv. Sambært NAFO-avtaluni kundi Føroya Landsstýri loyva einum føroyskum skipi í senn at royndarfiska í altjóða sjógvi á Grand Bank.

Royndarveiðan vísti, at nógvar og góðar rækjur vóru at fáa á leiðini, og við royndarveiðini mettu føroy-ingar, at teir kundu tryggja sær søgulig rættindi á hesi leið.

Men soleiðis skuldi tað ikki ganga.

Samlaða rækjukvotan á Grand Bank í dag er 13.000 tons, harav kanadiarar hava fingið tillutað 83%, ið teir, sum einasta limaland í NAFO, kunnu fiska í egnum sjógvi. Tey umleið 2.200 tonsini, ið eftir eru av kvotuni, verða býtt millum hini NAFO-limalondini, sum fáa 144 tons í part. Hesi tonsini, sum er eitt ógvuliga lítið tal at býta ímillum fleiri skip, skulu fiskast í altjóða sjógvi.

Føroyingar halda ikki, at býtið er rættvíst, tí vit vóru millum teir fyrstu at veiða rækjur á leiðini og halda okkum tískil eiga søgulig rættindi fram um onnur NAFO-limalond. Úrslitið er, at hvørki okkara rækju-skipafloti ella okkara myndugleikar hava góðtikið hetta býtið.

Sambært søguligum veiðitølum meta føroyingar seg eiga rætt til 62% av teirri kvotu, sum fellir uttanfyri tey 83% hjá kan-adiskum fiskimonnum. Men kortini hevur NAFO gjørt av at býta tey seinastu 17% í eins stórar - ella smá-ar partar - til øll 15 lima-londini, sum eftir eru.

Føroyskir myndugleikar hava treyðugt viljað gingið undir býtið hjá NAFO og hava ásett sína egnu kvotu, sum er góð 1000 tons.

Kanadiskir eftirlitsmenn hava av og á verið umborð á føroyskum skipum á Grand Bank og staðfest, at skipini ikki hildu seg til avtaluna. Hesum hava teir boðað føroyskum eftirlits-myndugleikum frá.

At enda tóku kanadisku myndugleikarnir tað stig at lata sínar havnir aftur fyri føroyskum fiskiskipum, og framvegis í dag eru havnir-nar stongdar fyri føroying-um.

Stríðið millum føroyskar og kanadiskar myndugleik-ar er avmarkað til leiðirnar á Grand Bank, tí á Flem-mish Kap gongur alt sína vanligu gongd, og føroying-ar hava ongar trupulleikar við at góðtaka tær treytir, sum her eru galdandi.

At havnirnar í Ný Found-landi eru stongdar fyri før-oyskum fiskiskipum, hevur gjørt tað trupult hjá rækju-flotanum, sum roynir á Flemmish Kap. Skipini hava lagt veiðina upp og skift manning í Ný Found-landi, men so leingi, stríðið er, er eisini hesin møguleiki burtur. Tí noyðast rækju-skipini at sigla heim við rækjunum, og hetta kostar teimum ein túr um árið í mistari tíð - ella einar 5-7 milj. krónur í peningi.

Tað er tó ikki bara føroyska rækjuvinnan, sum líður undir hesum stongsli; tað ger vinnan í Ný Found-landi eisini, sum hevur heystað fruktir av føroyska virkseminum har yviri.

Tá ið kanadisku myndug-leikarnir avgjørdu at útihýsa føroyskum fiskiskipum, úti-hýstu teir eisini estlendskum fiskiskipum, men viður-skiftini millum Kanada og Estland eru komin í rættlag aftur, og havnirnar eru lætn-ar uppaftur.

Ilt er at siga, nær ein loysn fer at spyrjast burtur úr trætuni millum Føroyar og Kanada, nú hesin fund-urin millum Jacob Vester-gaard og Robert Thibault endaði úrslitaleysur.